**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Skrivstovufólk

Vegna farloyvi verður søkt eftir skrivstovufólki til fulltíðarstarv í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. juli 2005.

**Starvslýsing**
Í høvuðsheitinum umfatar starvið skrivarauppgávur fyri leiðsluna. Starvið umfatar eisini sjúklingaskráseting, toll- og telefonavgreiðslu, skjalasavn og hjálp í bókhaldinum.

**Førleikakrøv:**
Tað er fyrimunur, at tann,ið settur verður, hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi. Eisini skal viðkomandi hava kunnleika at arbeiða við teldu, verða fyrikomandi, arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir:**
Løn og setanarviðurskifti, ið er treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Suðuroyar Sjúkrahús, Arnhild Tausen tlf. 371133.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verður at senda til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
FO-800 Tvøroyri

**í seinasta lagi 15. desember 2004.**

# Jólahugni á Barnabókasavninum

Barnabókasavnið skipar fyri jólahugna fríggjadagin 10. desember kl. 10.00-12.00.

Vit klippa, klistra, lurta eftir jólatónleiki og hugna okkum saman.

Aldur: børn upp til 7 ár.

Sí heimasíðu www.byarbok.fo
Tlf. 302030

**Býarbókasavnið**

# Jólahugni hjá Heilafelagnum

Vit hava jólahugna í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10, fríggjadagin 10. desember kl. 18.00.

Vit fáa ein bita og okkurt verður til undirhald.

**Heilafelagið**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Bioanalytikari

Fyri bioanalytikara í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara til Rannsóknarstovuni á Landssjúkrahúsinum í tíðarskeiðinum 17. januar 2005 til og við 30. juni 2005.

**Rannsóknarstovan umfatar m. a.**
- kliniska biokemi
- kliniska immunulogi
- kliniska mikrobiologi
- kliniska fysiologi
- patologi

Blóðroyndir verða tiknar úti á bygd eina ferð um vikuna.

**Førleikakrøv:**
- bioanalytitikaraútbúgving
- góð samstarvsevni
- fleksibilitetur

**Setanar- og lønarviðurskifti** smb. sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna við tilkallivaktum.

**Nærri upplýsingar** fáast við at seta seg í samband við leiðandi bioanalytikara Ivy Hansen, tlf. 304500, lokal 5601, e-post ivyh@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 14. januar 2005 kl. 12.00

**Skrivlig umsókn** í brævbjálva merktur »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# Frá Havnar Arbeiðsmannafelag

Aðalfundur felagsins verður 5. februar 2005.

Møgulig uppskot ið ynskjast viðgjørd á hesum fundi skulu skrivliga vera formanninum í hendi áðrenn 1. januar 2005.

Sambært grein 25 í viðtøkum felagsins skulu uppskot til formannsvalevni skrivliga vera nevndini í hendi innan 1. januar 2005.

Saman við uppskotinum skal vera váttan frá viðkomandi at hann vil lata seg stilla upp, umframt váttan frá 15 stillarum, sum skrivliga vátta, at teir stiðja viðkomandi til formannsvalevni. Stillararnir skulu uppfylla treytirnar í grein 12 fyri at hava atkvøðurætt.

**Nevndin**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur

**Vegna ov fáar umsóknir endurlýsa vit starvið.**

Á **hjartarehabiliteringini** á Landssjúkrahúsinum er hálvtíðar avloysarastarv leyst at søkja til setan 1. januar 2005 ella eftir avtalu til og við 31. juli 2005.

Hjartarehabiliteringin byrjaði 1. mars 2003 og hevur skrivstovu á B8.

**Arbeiðsøkið umfatar í høvuðsheitum**
- hjartarehabilitering, primera og sekundera fyribyrging móti hjartasjúkum
- arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar
- arbeiðið kemur at fevna um m.a. rehabilitering av hjartasjúklingum og fyribyrgjan, framt lutvíst í bólkum, lutvíst einsæris

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakliga vitan innan cardiologi
- arbeiðsroyndir innan røkt og viðgerð av hjartasjúklingum
- kunna arbeiða sjálvstøðugt og aktivt alla tíðina og kunnu søkja sær nýggja vitan innan arbeiðsøkið
- góð samstarvsevni
- teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða**
- eitt sera áhugavert arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- góða innleiðslu
- møguleikar fyri fakliga menning

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jórun Askham ella Eydnu Fosaa, sjúkrarøktarfrøðingar lokal 6058 ella Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 22. desember 2004 kl. 12.00. Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av CV, prógvum og møguligum viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo